*Lesandi á Fiskivinnuskúlanum:*

# So upplagt at velja fiskivinnuútbúgving

*- Eg havi hug at arbeiða við lidnum rættum ella við feskum fiski, tá eg verði liðugur við útbúgvingina, sigur Petur Ludvíg Joensen, Søldarfirði, lesandi á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna*

Byrjað varð í august -91, og hann var liðugur í juni -94, t.v.s tað er ein trý ára útbúgving.

- Eg valdi Fiskivinnuskúlan, av tí at eg hevði arbeitt bæði á sjógvi og á landi. Eg arbeiddi tvey ár á Lynfrost og var tvey ár til skips við einum trolara, og eg havi eisini fingist við aling. Tí var tað nærliggjandi at velja eina fiskivinnuútbúgving, fyri at fáa meir at vita um viðurskiftini og koma at vera meir við í menningini av fiskivinnu her á landi, sigur Ludvík.

Skúlin er skipaður við einum skúlastjóra, sum er Jákup Andreasen, og einum deildarleiðara, sum er Gardar Joensen.



### Nógvar lærugreinir

Fyri at klára seg allan vegin eru hesar lærugreinar neyðugar: fysik, kemi, biologi, mikrobiologi, EDV/hagfrøði, marknaðarlæra, arbeiðsleiðsla, virkisbúðskapur, aling, fiskivinna, fiskiýdna, matvørulæra, framleiðsla og samfelagslæra.

Fyrsta árið endar fysikk, aling, samfelagslæra og biologi.

- Eg gekk tríggjar dagar í skúla, síðani vóru hós- og fríggjadagar starvsvenjingar við fiskavirking, á ali- og smáltstøð, á arbeiðseftirlitinum og eisini á skúlanum, har royndir verað tiknar, so som TVN(samlað tal av kyknum í fiski), turrevni og aðrar royndir sum kunnu sigast at vera neyðugar í framleiðsluni fyri at tryggja varandi góðsku.

- Annað árið var ein rúgva av fakum at koma ígjøgnum. T.d var flokkurin hjá mær til próvtøku umleið 14 ferðir innanfyri ein góðan mánað, og tað var alt ov nógv.

### Uttanlands í praktikk

- Triðja árið hevði eg enskt og matematikk í hálvan annan mánað, og síðan var eg í starvsvenjing í tveir mánaðar. Eg fór til Grimsby í Onglandi hjá Faroe Seafood. Tað er eitt stórt virki við 300 starvsfólkum. Síðan aftur í skúla hálvan triðja mánað og starvsvenjing tveir mánaðir, har eg var ein mánað á Fiskavirking í Havn og ein mánað á Faroe Seafood í Hirtshals og so aftur ein mánað í skúla.

- Frágreiðing skuldi skrivast um starvsvenjingina, og eg fekk ummæli fyri frágreiðingina.

Aftaná kom próvtøkan í matvørulæru, munnligt/-skriftligt og í enskum, munnligt.

- Um møguleikin er til staðar, ætli eg mær at arbeiða við lidnum rættum. Tað, sum framtíðin serliga fer at brúka, er ferskur fiskur, pakkaður við sterkari vakum maskinu, sum fær fiskin til at halda seg fleiri dagar longri enn vanligur ísaður fisk, og tí kundi eg eisini hugsað mær at arbeitt við, sigur Ludvík.

**tórstein**

# Martin Heinesen leiðari á Oljufyrisitingini

Landsstýrið samtykti fyrst í november 1993, at umsitingin av undirgrundini skuldi vera í upprunaliga sekretariatinum hjá oljuráðleggingarnevndini í tøttum samarbeiði við jarðfrøðisavnið, og at umsitingin refererar til lønardeildina í Tinganesi.

Landsstýrið hevur síðan á fundi tann 22. apríl 1994 samtykt, at skipanin fyri Oljufyrisitingina verður hendan:

Uppgávurnar hjá stovninum eru hesar:

– *Oljufyrisitingin arbeiðir við ábyrgd mótvegis landsstýrinum.*
– *Oljufyrisitingin umsitur mál sambært galdandi lóggávu, reglugerðum v.m.*
– *Umsitur mál, sum landsstýrið leggur til stovnin.*
– *Gevur landsstýrinum ráð og vegleiðing í øllum spurningum innan økið, harundir uppskot til lógir, reglugerðir og generellar rættningslinjur.*
– *Umsitur alt, sum beinleiðis hevur við málsøkið at gera, og hevur ábyrgdina av at samskipa alt virksemi við tilknýti til málsøkið við aðrar stovnar.*
– *Er skrivstova hjá oljuráðleggingarnevndini.*

Martin Heinesen, deildarleiðari á jarðfrøðisavninum er fyribils settur sum leiðari á Oljufyrisitingini.




## GOTT BINGO

**verður í Pálsstovu sunnudagin 5. juni**

**Nógvir góðir vinningar, so sum ræstur fiskur, turr tjógv, 10 gávukort á 500,- kr. og annar døgurðamatur.**

**15 vinningar á lutaseðli. Høvuðsvinningurin gávukort á 1.500,- kr.**

**Eykaspæl verður.**

**Møguleiki at verða koyrdur heim aftaná.**

**GJÁAR SAMKOMUHÚS**


## VALUTAKURSIR

| | | 03.06.94 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollari** | 651,50 | 643,50 |
| *Bretland* | **Pund** | 981,62 | 971,88 |
| *Týskland* | **Markur** | 392,66 | 392,14 |
| *Svøríki* | **Króna** | 82,49 | 82,71 |
| *Noreg* | **Króna** | 90,54 | 90,40 |
| *Frakland* | **Frankur** | 114,93 | 114,65 |
| *Belgia* | **Frankur** | 19,073 | 19,043 |
| *Sveits* | **Frankur** | 462,33 | 460,14 |
| *Holland* | **Gyllin** | 350,27 | 349,67 |
| *Italia* | **Liri** | 0,4025 | 0,4044 |
| *Finnland* | **Markur** | 118,45 | 118,46 |
| *Ísland* | **Króna** | 9,17 | 9,10 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 55,813 | 55,753 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,755 | 4,755 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,776 | 3,770 |
| *Kanada* | **Dollari** | 470,57 | 464,29 |
| *Japan* | **Yen** | 6,1888 | 6,1579 |
| *Írland* | **Pund** | 958,81 | 955,15 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,624 | 2,659 |
| | **XEU** | 756,91 | 754,50 |

Kelda: **Føroya Sparikassi**


## Tvangsauktion over løsøre

**Torsdag den 16. juni 1994 kl. 10.50**

afholdes på fogedrettens kontor, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, tvangsauktion, (AS 106/94), efter begæring af Annfinn Hansen, Niels Finsensgøta 23, 100 Tórshavn, telefon 1.0193, (j. nr. 259/93), på vegne likvidationsboet P/F Faroe Sea Farm Ltd. i likvidation over

Ringar nr. : 1–2
– – : 3–6
– – : 7–10
– – : 11–12 og 13–18

Nærmere oplysninger om auktionsgenstandene og auktionsvilkårene kan fås ved henvendelse til ovennævnte advokat.

**Færøernes fogedret,** *01.06.94*
**Mette Søgaard-Nielsen**
**dfm.**